# Málar mest við fingrunum

**52 ára gamla Emma Heinesen úr Klaksvík er útbúgvin sjúkrahjálpari, fyrrverandi flogterna, ferðaleiðari og listakvinna. Hon hevur í komandi døgunum listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík**



LIST
*Ingrid Bjarnastein*

25 málningar skulu í eina viku hanga í Smiðjuni í Lítluvík. Málningarnar eigur Emma Heinesen úr Klaksvík.

– Eg havi málað síðani eg var smágenta, men tað er ikki fyrr enn nú eg havi torað at víst fram, sigur Emma Heinesen. – Eg havi fyrr verið við á norðoyarstevnu framsýningum og framsýningum á ólavsøku uppi í útvarpshøllini.

Málningarnir í Smiðjuni verða mest oljumálningar. Emma byrjaði at fáast við oljumáling tá hon sum 18 ára gomul fekk eitt oljusett í føðingardagsgávu.

– Eg royni at festa meg við litirnar, greiðir Emma frá. –Tað er sjáldan at eg eigi meira enn tríggjar ymiskar litir. Blátt, reytt og gult eru uttan iva høvuðslitirnir í málningunum. Mær dámar best at mála við fingrunum. Tá verður tað mest eitt samanspæl millum formar og litir.

Høvuðsevnini á málningunum er fólk og náttúra. Íblásturin finnur Emma Heinesen alla staðni.

– Eitt prát við onkran kann verða fest á pappír, sigur Emma. – Eisini hendingar, bæði syrgiligar og gleðiligar kann eg finna upp á at mála.

Tey, ið hava hug, at síggja málningarnar hjá Emmu Heinesen, kunnu leita sær í Smiðjuna í Lítluvík. Framsýningin letur upp seinnapartin í dag og heldur fram til sunnukvøldið.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, men seinnapartin gul av ymsum ættum og eitt skifti regn. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk millum útsynning og landsynning. Stundum regn ella ælingur og hitin millum 6 og 10 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 14 |
| Tromsø | 5 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 26 |
| Malta | – |
| Tunis | – |
| Beijing | 18 |
| New Dehli | – |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 321 |
| Sydney | 6 |
| New York | 11 |
| Miami | 20 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 986 hPa. eystan fyri Skotland fer eystureftir og grynnist. Eitt lágtrýst, 982 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum í nátt.




Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað og sunnan fyri lágtrýstið rekur óstøðug vestanluft móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/10 kl. 06⁰⁰– 09/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 08/10 kl. 06⁰⁰– 09/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 39,1 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

10. okt.: Seinna kvarter
14. okt.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. okt | 00.56 | 13.37 | — | 12.37 | 00.11 | 12.52 | 02.56 | 15.37 | 03.56 | 16.37 | 11.52 | — | 10.52 | 23.33 | 01.11 | 13.52 | 02.11 | 14.52 | 00.41 | 13.22 | 01.56 | 14.37 |
| 11. okt | 02.18 | 14.59 | 01.18 | 13.59 | 01.33 | 14.14 | 04.18 | 16.59 | 05.18 | 17.59 | 00.33 | 13.14 | — | 12.14 | 02.33 | 15.14 | 02.33 | 16.14 | 02.03 | 14.44 | 03.18 | 15.59 |
| 12. okt | 03.25 | 15.51 | 02.25 | 14.51 | 02.40 | 15.06 | 05.25 | 17.51 | 06.25 | 18.51 | 01.40 | 14.06 | 00.40 | 13.06 | 03.40 | 16.06 | 04.40 | 17.06 | 03.10 | 15.36 | 04.25 | 16.51 |
| 13. okt | 04.15 | 16.40 | 03.15 | 15.40 | 03.30 | 15.55 | 06.15 | 18.40 | 07.15 | 19.40 | 02.30 | 14.55 | 01.30 | 13.55 | 04.30 | 16.55 | 05.30 | 17.55 | 04.00 | 16.25 | 05.15 | 17.40 |





BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
Tlf. 213212